# Ein fantastisk uppliving

*John Lawton var vælnøgdur eftir konsertina*



**Uriah Heep sangarin John Lawton fór á pall sum seinasta navnið á Jóansøkufestivalinum, og sum høvuðsnavn, vit fingu orð á orkufulla sangaran og kvinnuna handan røddina**

*Maud Næs*

John Lawton, hvat dámdi tær at spæla á Jóansøkufestivalinum?

- Ein fantastisk uppliving, alt eydnaðist væl. Veðrið var gott, og tað var turt. Áhoyrarnir gingu ikki og mældu, men vóru standandi og teir vóru við, sungu við. Tað var ein fantastisk uppliving.

Hvussu var at syngja saman við Deiggj, tá tit ongar royndir hava saman frammanundan?

- "Vit vandu einaferð áðrenn og tað gekk væl. Teir í Deiggj eru góðir tónleikarar og tað gekk væl at spæla saman, tað hevur verið ein góð uppliving.

Er hettar fyrstu ferð tú ert í Føroyum?

- Ja, tað er fyrstu ferð, at kona mín, Iris og eg eru í Føroyum, vit hava fingið eina góða móttøku og alt hevur eydnast væl.

Iris Lawton, hvat heldur tú verða áhugavert í Føroyum?

- Litirnir, allar hesar litirnar á húsum og náttúran. Alt tykist so stilt og róligt.

Iris Lawton, tit hava liva saman síðan í 60-unum, eiga børn, er tað ikki sjáldsamt í tí tónleikaheimi, tit hava liva alt lívið í?

- Jú, men tað er helst tí, at vit hava verið saman alla tíðina. Eg havi øll árini verið maneagari hjá John og havi ferðast saman við honum, eisini tá børnini vóru smá.

John og Iris Lawton vóru bergtikin av Føroyum og vónandi sær man tey aftur eina aðru ferð og fær høvið at hoyra hansara góðu og vøkru rødd.



## Daniella Andreasen:

**- Eg eri ónøgd við mátan tónleikararnir verða viðfarnir. Teir hava fyrireikað seg og vant í 14 dagar, men hava ongantíð fingið eina endaliga skrá. Nógvir av teimum fáa ongar pengar fyri tað, gjalda alt sjálvir, eisini ferðina suður. Tá teir so koma suður, er ongin móttøka. Teir mugu sjálvir finna útav at fáa sær at eta og gisting. Flestu tónleikabólkarnir fingu ikki eingongd ljóðroynd. Ikki tí, fólk eru blíð og fitt. Tað endaði við, at ein "lokal", sum onki hevði við festivalin at gera, Anne Kirstin, gav okkum at eta. Burtursæð frá hesum, so eru teir suðringar, sum eg havi møtt, gestablíðir, sjálvironiskir og so banna teir so forbannað illa!**

# Vælnøgdur fyriskipari

Fyrireikararnir av Jóansøkufestivalinum eru vælnøgdir, men vita samstundis, at sumt skal gerast betur komandi ár. Vit fingu orð á Kristian Holbæk, fyriskipara. Kristian, onkur finnist at umstøðunum hjá tónleikarunum, tá teir komu suður, at ongin tók sær av teimum, eisini eru onkrar atfinninar um, at festivalskráin einans var á netinum, hvat sigur tú til tað?

– Tað er ivaleyst okkurt at fýlast á. Vit hava verið ov fá um at fyriskipað tiltakið og skaffa pengar til tiltakið. Vit hava arbeitt hart og roynt. Vit mugu vera fleiri næsta ár, soleiðis, at alt tá verður í lagi. Tað góða er, at hesin Jóansøkufestivalurin eydnaðist nógv betur enn síðsta ár. Tað vóru nógv fólk seinni um kvøldið og øll tykjast væl nøgd. Tað verður spennandi at gera upp, vænti ikki hesin gevur undirskot.

**Maud Næs**